# Stóri var væl fyri

**Føroyski landsliðsvenjarin var sum vera man fegin um úrslitið, og yvir høvur vórðu nógvar rósur býttar út á tíðindafundinum, har einasta staðfestingin tó tóktist vera, at miðverjan verður hin sama til landsdystin móti skotum**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*



*Henrik Larsen var sum vera man fegin um úrslitið, og rósti serliga miðverjuni fyri teirra avrik, men yvirhøvur var nýggji landsliðsvenjarin væl nøgdur við allar leikararnar.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Einki er at siga til, at tað var ein væl hýrdur Henrik Larsen, sum eftir landsdystin mikukvøldið kom á tíðindafund við pressuna. Spurningar vórðu settir á bæði donskum, týskum og enskum, og sum mest náttúrliga partin av øllum svaraði »stóri« aftur á teimum málum, sum spurningarnir komu á.

Fyrst og fremst var tað sjálvandi sjálvur sigurin, sum hevði sent hýrin í topp.

- Eg kann ikki vera annað enn nøgdur um sjálvt úrslitið, og ikki minst um at Føroyar nú endiliga hava skorað á Tórsvølli, legði venjarin fyri.

- Hartil frøddi tað meg eisini, at vit vóru spælstýrandi somikið stóran part av dystinum.

Tá ein skotstkur blaðmaður síðani dittaði sær at spyrja, hvørt venjarin var fegin um stríðsviljan hjá hansara monnum, nú teir høvdu vent 0-1 til 3-1 segði Henrik, at tað var hann sjálvsagt, men hann legði tó afturat, at hetta visti hann av egnum royndum frammanundan, so tí partinum hevði hann ongan tíð ivast í.

## Nervar gjørdu sítt

Nýggja spælskipanin hjá landsliðnum var sjálvandi eisini umrødd, og yvir høvur var venjari positivur í eftirmetingini, tó at hann var samdur í, at leikararnir kanska hildu dekan ov fast í hesari fyrstu longu løtuna.

- Lat meg fyrst siga, at orsøkin til at tað lat seg gera at spæla 4-4-2 somikið væl fyrst og fremst er Jógvan Martin Olsen. Hann hevur framt eitt framúr arbeiði hesar fyrstu mánaðirnar, og tí vóru grundleggjandi lutirnir fingnir upp á pláss, longu áðrenn eg kom.

- Yvir høvur eri eg sera væl nøgdur um avrikið hjá leikarunum, men tað er rætt, at vit ikki vóru nóg dugnaligir at bróta keturnar í fyrra hálvleiki. Hetta er tó helst púrasta náttúrligt, nú spælararnir fyri fyrstu ferð spældu við nýggju skipanini og eisini við nýggjum venjara. Teir gjørdust kanska ov fastlæstir á sínum plássum, »tí venjarin segði eg skuldi standa her«, men tá nervarnir loysnaði í seinna hálvleiki, fingu vit veruliga glið á.

- Ikki tí. Eg var eisini væl nøgdur um fyrra hálvleik, og tó at spælið tá ikki var eins nøktandi, so skapa vit eisini fleiri málmøguleikar, og skoraðu vit tá, kundi dysturin kanska forma seg heilt øðrvísi. Nú sluppu teir at leggja seg longur aftur á vøllin, og tað gav okkum trupulleikar eina løtu, men tíbetur fingu vit so loyst hesar.

Tá vit at enda spurdu Henrik Larsen, um tað vóru einstakir leikarir, sum hann hevði hug at taka fram, var hann kanska eitt sindur trekur at byrja við.

- Skal eg taka nakað framum, so má tað vera miðverjan, har Óli og Jón Rói báðir spæla framúr væl, men yvirhøvur eri eg væl nøgdir um allar leikararnir. Vit hava tveir málverjar, sum standa ein feilfrían hálvleik í part, og tó at eingin var skiftur út vegna ónøgd, so sýndu allir innskiftararnir, at teir væl eru førir fyri at traðka inn á liðið, og tað er so avgjørt at fegnast um.

## Bíðar nakað enn

At enda fall tosið inn á komandi uppgávuna móti skotum, men her var venjarin meira trekur at svara.

-Lat okkum nú bara vóna, at Danmark vinnur við einum 4-5 málum, so teir einki sjálvsálit hava, tá teir koma hendanvegin, helt hann skemtandi fyri, áðrenn hann aftur gjørdist meira álvarsamur.

-At tosa um tann dystin longu nú, er kanska dekan ov tíðliga. Sjálvandi fekk eg nógv burtur úr hesum dystinum, men eg kann tó ikki seta liðið enn. Tað kann jú vera, at nakrir leikarar verða skaddir, og so er eisini at vóna, at onkur teirra, sum gav avboð hesaferð, verður tøkur til tann dystin. Akkurát hvussu kortini verað blandað, kann eg tí ikki siga enn, men tað mugu Jógvan Martin og eg so finna út av komandi vikurnar, segði ein væl hýrdur Larsen at enda, áðrenn hann saman við FSF umboðunum legði leiðina niðan á Hotel Føroyar.

# Misjavn hjá okkara bólki

**Øll liðini í bólki í EM-undankappingini vóru í dysti mikukvøldið, men tað var misjavnt, hvussu hetta royndist**

ALTJÓÐA DYSTIR
*Jákup Mørk*

Um góðar tvær vikur skulu Føroyar spæla móti skotum, men grannar okkara úr Danmark syrgdu í øllum førum fyri, at útgangsstøðið hjá skotum ikki er nakað serligt undan dystinum.

Higartil hevur venjaraskeiðið hjá Berti Vogts ikki roynst serliga væl, og móti dønum gekk lítið betri, enn tað hevur gjørt higartil. Tað var bert málið hjá Ebbe Sand, sum var á muni, tá dysturin var lokin, men tað stóð tó øllum greitt, at danir so ruddiliga vóru við yvirlutan, og í Skotlandi eru fleiri longu farin at ivast, um tað var ein røtt avgerð at seta Vogts sum venjara, so einki er at ivast í, at trýstið á venjaranum er stórt, tá farið verður til Føroya.

## Bert Ísland vann

Heldur ikki hjá Týsklandi gekst nakað serligt mikukvøldið. Á útivølli máttu teir taka til takkar við javnleiki móti Bulgaria, og fyri eitt lið, sum júst er kosið sum hitt næstbesta í heiminum, man hetta neyvan vera nøktandi. Serstakliga ikki, tá týskarar framhaldandi halda seg hava nakað at hevna, eftir at Stoichkov, Letchkov og hinir sendu Týskland úr HM fyri átta árum síðani.

Litava, sum eisini er í okkara bólki, hevði vitjan av Ísrael, og tó at heimaliðið hevði leiðsluna í steðginum, so endaði tað við tryggum útisigri, og hetta man neyvan vera besta upptaktin, nú liðið skal royna seg á heimavølli móti Týsklandi.

Sostatt vóru tað bert Føroyar og Ísland, sum vunnu upphitingardystirnar í okkara bólki. Ísland hevði vitjan av Andorra, og her var eingin ivi. Longu eftir fyrra hálvleik hevði Ísland vunnið sær tryggja leiðslu, og so var bert at halda fast um hesa. Vandamikli Eidur Gudjohnsen legði íslendingar á odda, áðrenn royndi Rikardur Dadason við tveimum málum kundi staðfesta sigurin.

**Vinardystir, leiktir mikukvøldið**

**Skotland-Danmark 0-1 (0-1)**
0-1: Ebbe Sand, 9

**Bulgaria-Týskland 2-2 (1-1)**
1-0: Dimitar Berbatov, 20
1-1: Michael Ballack (br.), 23
2-1: Krassimir Balakov (br.), 49
2-2: Arne Friedrich, 56

**Litava-Ísrael 2-4 (2-1)**
1-0: Arturas Fomenka, 10
1-1: Afek Omri 20
2-1: Roberto Poskus, 32
2-2: Zandberg, 48
2-3: Afek Omri, 64
2-4: Idan Tal, 72

**Ísland-Andorra 3-0 (3-0:**
1-0: Eidur Gudjohnsen, 24
2-0: Rikardur Dadason, 31
3-0: Rikardur Dadason, 42

**Russland-Svøríki 1-1 (0-0)**
1-0: Alexander Kerzhakov, 56
1-1: Zlatan Ibrahimovic, 93

**Aserbadjan-Usbekistan 2-0 (1-0)**
1-0: Samir Aliyev, 40
2-0: Emin Guliev, 80

**Ukraina-Iran 0-1 (0-0)**
1-0: Ali Daei, 57

**Letland-Hvítarussland 2-4 (2-2)**
0-1: Vitali Kutozov, 16
1-1: Maris Verpakovski, 18
2-1: Yuris Layzans, 25
2-2: Alexander Kulchiv, 26
2-3: Miroslav Roaschenko, 64
2-4: Miroslav Roaschenko, 83

**Estlan-Moldova 1-0 (0-0)**
1-0: Teet Allas, 54

**Finnland-Írland 0-3 (0-1)**
0-1: Robbie Keane, 11
0-2: David Healy, 74
0-3: Graham Barret, 82

**Noreg-Holland 0-1 (0-0)**
0-1: Edgar Davids, 69

**Turkaland-Georgia 3-0 (1-0)**
1-0: Arif Erdem, 7
2-0: Cihan Haspolatli, 51
3-0: Nihat Kahveci, 71

**Rumenia-Grikkaland 0-1 (0-1)**
0-1: Styliano Gianna kopoulos, 16

**Kroatia-Wales 1-1 (0-1)**
0-1: Simon Davies, 9
1-1: Mladen Petric, 78

**Makedonia-Malta 5-0 (2-0)**
1-0: Aco Stojkov, 37
2-0: Artim Sakiri, 40
3-0: Georgi Hristov, 54
4-0: Artim Sakiri, 60
5-0: Goran Pandev, 86

**Luksemburg-Marokko 0-2 (0-0)**
0-1: Mohammed Jabrane, 71
0-2: Nouredine Kacimi, 85

**Póland-Belgia 1-1 (1-1)**
1-0: Macieg Zurawski, 4
1-1: Wesley Sonck, 40

**Kekkia-Slovakia 4-1 (1-1)**
0-1: Szilard Nemeth, 15
1-1: Jan Koller, 32
2-1: Jan Koller, 64
3-1: Tomas Rosicky, 70
4-1: Tomas Rosicky, 74

**Bosnia Hersegovina-Jugoslavia 0-2 (0-2)**
0-1: Mladen Krstajic, 34
0-2: Darko Kovacevic, 42

**Ungarn-Spania 1-1 (0-0)**
0-1: Raul Tamudo, 53
1-1: Vasile Miriuta, 71

**Sveis-Eysturríki 3-2 (2-1)**
0-1: Roman Wallner
1-1: Hakan Yakin, 20
2-1: Alexander Frei, 42
3-1: Murat Yakin (br.), 75
3-2: Roman Wallner, 80

**Italia-Slovenia 0-1 (0-1)**
0-1: Sebastian Cimirotic, 31

**Tunis-Frakland 1-1 (1-1)**
0-1: Michaeil Silvestre, 19
1-1: Ali Zitouni, 38

**Norður Írland-Cypros 0-0**

**Brasilia-Paraguay 0-1 (0-1)**
0-1: Nelson Cuevas, 26



Debutanturin Sjúrður Jacobsen:

# - Super



*Debutanturin Sjúrður Jacobsen var fegin um at fáa nakrar minuttir á vøllinum ímóti Liktinstein, og vónaði at fáa landsliðsboð aftur til dystin ímóti Skotlandi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Spurdur um, hvussu tað var at fáa sín fyrsta dyst fyri landsliðið, svaraði NSÍ-leikarin Sjúrður Jacobsen stutt og greitt: Super.

Sjúrður var ikki upprunaliga úttikin, men vegna avboð, vóru boð send eftir honum.

– Av tí, at eg var einasti vinstribakkur aftaná Arnbjørn, hevði eg vón um at fáa nakrar minuttir á vøllinum í dag, og at tað blivu góðir 20 minuttir, er bara at fegnast um, segði Sjurður Jacobsen eftir dystin.

Sjálvur var Sjúrður hampiliga væl nøgdur við avrik sítt, og vísti á, at Liktinstein-leikararnir vóru sera kvikir, og tað gav honum nakrar trupulleikar á vinstra bakki.

– Í Føroyum eru vit ikki vanir við slíkan skjótleika, og tí slapp maðurin hjá mær einaferð ígjøgnum, fortaldi Sjúrður frá

Runavíkingurin helt eisini, at tað væl kundi vera, at hann nýtti gott av, at úrslitini hjá NSÍ eru so góð í løtuni, og hetta kann hava gjørt, at hann hesaferð fekk landsliðsboð.

– At vit í NSÍ leika somu spæliskipan sum landsliðið, hjálpir eisini avgjørt mínum møguleikum at vera við á landsliðnum, segði Sjúrður Jacobsen.

Spurdur um hvørjar vónir hann hevur fyri úttikin til dystin ímóti Skotlandi, svaraði Sjúrður, at vónaði tað, men at hann kortini væntaði onki.

– Verður Jens Kristian klárur aftur, so verður helst torført hjá mær at vinna pláss ímillum teir átjan, men eg eri bara noyddur at gera mítt besta við NSÍ, og so fáa vit at síggja, segði Sjúrður Jacobsen at enda,

Fróði Benjaminsen:

# -Stuttligt at skjóta mál



*Fróði Benjaminsen var fegin um at byrja inni ímóti Liktinstein, og hann takkaði fyri álitið við skjóta sítt fyrsta mál fyri landsliðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

B68-leikarin Fróði Benjaminsen hevur verið á landsliðnum í góð trý ár, og mikudagin skeyt toftamaðurin so sítt fyrsta mál á føroyska landsliðnum.

– Tað er bara stuttligt, at tað endiliga eyðnaðist mær at skjóta mál á landsliðnum, segði Fróði Benjaminsen eftir dystin

Fróði greiddi eisini frá, at hann helt, at nýggja spæliskipanin virkaði væl, og at hann var serliga fegin um innstillingin hjá spælarunum í dystinum ímóti Liktinstein.

– Vit stríðast væl í dag, og allir halda tær avtalur, vit gjørdu undan dystinum, so tað kann ikki verða betri, segði Fróði Benjaminsen

Miðvallarin var eisini sera fegin um, at Henrik Larsen lat seg byrja inni ímóti Liktinstein, tí nýggja spæliskipanin kundi havt við sær, at Fróði byrjaði uttanfyri.

– Nú var eg blivin fastur maður á liðnum hjá Allan Simonsen, og so tað er gleðiligt, at nýggi landsliðsvenjarin eisini ætlar at nýta meg, vísti Fróði á.

Annars helt Fróði dystin verða væl leiktan, og at tað er bara gleðiligt, at nýggja landsliðið legði út við einum sigri.

Liktinsteinski-venjarin, Ralf Loose:

# – Vit standa ikki saman í seinna hálvleiki

*Venjarin hjá Liktinstein rósti føroyska stríðsviljanum, og um føroyingar stríddust so væl ímóti skotum, so væntaði hann, at Skotland fór at fáa stórar trupulleikar av føroyska landsliðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Venjarin hjá Liktinstein, Ralf Loose, hevur staðið ódda fyri landsliðnum í fýra ár, og hetta var triðju ferð, at hann og hansara menn taptu fyri føroyingum.

– Vit er frammanfyri í hálvleikinum, men í seinna hálvleiki megna vit ikki at standa saman sum eitt lið, og tí tapa vit dystin, segði Ralf Loose eftir dystin.

Venjarin hjá Liktinstein rósti eisini stríðsviljanum hjá føroyska landsliðnum, og um føroyingar stríddust so væl ímóti skotum, so ivaðist hann ikki í, at skotar komu at fáa trupulleikar av føroyska landsliðnum.

Spurdur um, hvat hann sum venjari kundi nýta úrslitið til, svaraði Ralf Loose, at dysturin kundi nýtast sum fyrireiking til komandi EM-undankappingardystin ímóti Makedonia.

– Eg eri glaður um hvørja ferð landsliðið savnast, tí tað gongur ofta langt ímíllum, og fyri at betra um okkara avrik, eru vit noyddir at royna at fáa okkurt positivt úr øllum okkara dystum, líka mikið um vit tapa ella vinna.

Ralf Loose vísti eisini á, at fleiri av hansara spælarum sita á bonkinum í teirra feløgum, og tað hevur eisini við, at teirra dystarvenjing ikki er av tí besta, og tað kundi ein síggja aftur í seinna hálvleiki, tá hansara menn ikki vóru mentir at fylgja við føroyska landsliðnum.

Ralf Loose helt føroyska landsliðið vera gott, og hann var fegin um dagarnar í Føroyum, og segði at Føroyar vóru serligar, og honum dámdi væl her.

Mario Frick:

# – Sigurin hjá Føroyum uppiborin

*Stjørnan á landsliðnum hjá Liktinstein, Mario Frick, var fegin um sítt mál, men helt samstundis, at sigurin hjá Føroyum var uppiborin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



FÓTBÓLTSPRÁT
*Páll Holm Johannesen*

Stjørnuspælarin hjá Liktinstein, Mario Frick, sum spælir fyri Serie A liðið í Italia, Verona, helt, sigurin hjá Føroyum vera uppibornan.

– Vit spæla ein góðan fyrra hálvleik, men í seinna hálvleiki eru føroyingar nógv meira ágangandi, og fáa trý mál, og samanumtikið vóru teir betra liðið í dag, og høvdu uppiborið sigurin, segði Mario Frick eftir dystin

Mario Frick hevur havt steðg á landsliðnum í 15 mánaðir, og dysturin ímóti Føroyum var hansara fyrsti eftir hann at boðaði frá, at ikki var tøkur til landsliðið.

Spurdur um hann var fegin um at vera á landsliðnum aftur, svaraði Mario Frick, at tað kendist væl, og serliga kendist tað væl at skjóta mál í dystinum

– Í dag væntaði eg, at vit fóru at vinna dystin, og tað er ófatiligt, at vit nú hava tapt tríggjar ferðir ímóti Føroyum, men soleiðis er fótbóltur einaferð, og vit verða bara noyddir at gera tað betri næst ferð, segði ein vónbrotin Mario Frick at enda.